# Er hetta bara ein floskul?

JOHAN DAHL
Løgtingsmaður



**- Veiðutrýst, fiskastovnar, uppmáting av skipum og bátum og burðardygg , skynsom veiða…**

Í hesum døgum verður tosað nógv um toskamangul og støðuna hjá okkara fiskastovnum, alt meðan við framvegis siga, at okkara fiskidagaskipan er "heimsins besta" skipan.

Er skipanin nú so sjálvregulerandi sum vit halda?

Hvat hjálpir tað at hava eina sokallaða sjálvregulerandi fiskidagaskipan, um vit so - hóast hesa síðan 1998 - eru endaðir í einari støðu, har tillagingar og m.a. praksis og tulkingar av reglum og kunngerðum føra við sær, at veiðuorkan alsamt økist?

Vit hava roynt at bøtt upp á støðuna síðan 2004, men tað er kanska ov seint.

Eisini tað, at pelagiski flotin kann veiða heilt inn á bestu upsaleiðir, talar fyri seg.

Er nýtti uppmátingar hátturin og definitión av veiðutrýsti tann rætta fyri allar bólkar?

Spurningurin er, um skipanin við uppmáting og veiðuorku av skipum og bátum ikki við at verða undirgrivin, og spurningurin er eisini um nýtti hátturin tann rætti??

Kanst tú útrokna veiðuorku av førum undir fiskidagaskipanini - og uppgera hesa yvir ein kamb eftir háttinum longd x breidd x dýbd x hestakreftir?

Sjálvur meti eg ikki, at allir bólkar kunnu uppgerast eins.

Hygg t. d. eftir partrolarum undir skipanini - so má tað verða pelatrekk og spælorka, sum er avgerandi og ikki um skipið er 1-2-3 ella 20 kubikk størri ella minni.

Tak garnaskipini - hesi hava loyvi til t. d. 1500 gørn - hvat hevur tað at gera við nýtta uppmátingarháttt??

Tey 1500 gørnini avgera veiðuorkuna og ikki skipið, um tað er 1 ella 2 metrar longri ella styttri.

Djúpvatnstrolararnir - teir eru als ikki undir fiskidagaskipanini, men verða í veiðuorku roknaðir út eftir hesi - hetta sjálvt um teir ikki eru nevndir í kunngerðini.

Her má tað sjálvandi eisini verða pelatrekk og spælorka sum er avgerandi fyri veiðuorku/trýst.

Línuskipini - seta 35-40.000 húkar, men longd x breidd x dýbd x HK avgera veiðuorku/trýst.

Pelagiski skipaflotin er øktur frá vanliga at hava 3-4.000 hesta maskinorku til nú hava hava 6000 hestar og uppeftir, útgerðin er ment, umframt leingingar er framdar av fleiri av hesum skipum, - hvussu verða hesi roknað, tá tað um veiðutrýst og orku snýr seg??

Her fyri at nevna nakrar bólkar, sum allir eru ymiskir.

Eg dugi illa at síggja, hvussu man yvir ein kamb á henda hátt kann gera ein so diversifiserðan flota upp á henda hátt í veiðutrýsti.

Hetta eigur at blíva endurskoðað skjótast.

Skipanin farin á glið?

Tak t. d. trolbátar á landleiðini – hesir vóru upprunaliga smáir døllar sum vóru uppmáldir eftir "gomlu" skipanini, men eru nú við orsakað av BT uppmátingini og leingingum blivnir til meðalstórir trolarar. Hesir hava flestir 70 fiskidagar, men dúva upp á fiskidagar, sum keypast kunnu frá ørðum bólkum seinastu 3 mð av árinum.

Hetta er púra burturvið – og tó loyvt sambært ásetingunum í lógini. Skipini verða longd, størri skrúvu, dysu osfr. Og so koma ánarirnar og leggja trýst á politiska myndugleikan eftir meira døgum.

Eftir míni metan eina sera óheppin og ikki haldbar gongd.

Línuskipini eru blivin til 25 frá 18-19. Henda øking hendi øll áðrenn 110 tons skottið kom í.

Hesin skipabólkur hevur sostatt eisini fingið nógv størri veiðiorku við 7 fleiri skipum, síni støðd og við 35-40.000 húkum hvørja setu.

Hvussu nógv er t. d. innflutningurin av húkum økt frá 1996 til 2006?? ella frá 2001 til 2004 t. d. – tað er eitt gott barometur yvir húkaveiðuna.

Taka vit trýstið á Føroya Banka, so er hetta fleirfaldað frá 2000 –2006 og økið er niðurfiskað orsakað av alt ov stórum veiðutrýsti hesi seinastu árini.

Hetta heldur ikki upp á sikt.

Hví fiska vit t. d. ikki meira á djúpum vatni part av árinum? – norðmenn ríka seg upp við frystilíniskipum í føroyskum sjóøki ár eftir ár, meðan vit stórt sæð ikki veiða har.

Utróðrabátarnir sum flestir fyrr vóru vanligir "útróðrabátar" upp á 26-32 føtur eru nú so mikið nógv størri og effektivari við sínum fleiri hundrað hestakreftum og harvið skjótleika at skifta frá miði til mið og eini støðd sum liggur frá kanska heldur 32 føtur og uppeftir.

Mangir av hesum hava út móti somu veiðuorku, sum tey smærru línuskipini - er tað rætt og ráðiligt? Víst kann man siga, at streymur, veður og vindur stýra og ávirka rakstur, men at veiðutrýstið er økt er onki at ivast í.

Partrolarirnir hava eisini somuleiðis økt munandi um sína veiðuorku við leingingum og nýíløgum av skipum .

Hyggja vit t. d. at útskiftingarfrymlinum, sum er brúkt viðv teimum 8 cubatrolarunum, ið blivu seldir, endaði man við einari kvadatróts-umrokning sum fekk "kabalina" at ganga upp, so 6 skip kundu fáast inn/býtast ístaðin tey gomlu 8,- ivaleyst tí man mixar gamlar og nýggjar reglur og kunngerðir fyri at fáa kabalina at ganga upp. Hyggur ein at teimum skipum, sum verða bygd og keypt ístaðin, so er lítð at ivastí, at man økir um veiðuorku.

Alt hetta er ilt at skilja, alt meðan tosað verður um burðardygga og skynsama veiðu.

Pelagiska vinnan á sama hátt - har eru skip komin inn sum ídnaðarskip við ivasamari motororku í mun til orkuna á útskiftu skipunum og skuldu einans veiða til matna, men landa nú sum vanlig uppisjóvarskip bæði til matnað og guan. Tillaging verður tað nevnt.

Leingingar og nýbyggingar hava eisini her økt um veiðuorku/trýst seinastu árini, - men her er at siga at, nú er so TAC á svartkjaftinum og kvotabýti á restini av hesum fiskasløgum, so tað forðar fyri ovurfisking, og tí hevur uppmáting onga meining sum so.

Við Barentshavsflotanum er sama ger seg galdandi sum við við uppisóvarskipunum – her er kvota ásett og tískil kann reiðarin tillaga skip sítt eftir hesum treytum og ikki eigur at verða neyðugt at hyggja eftir long x breidd x dýbd x hk

Tað er sjálvandi umráðandi at hava góðar arbeiðs- og umborðumstøður fyri fiskivinnuna, um vit skulu halda manningarnar á skipunum, og tí er tað eisini upp á sítt pláss at hyggja at skipanini og revidera hana og rætta skeivleikarnir og menna hana.

Eg ivist í, um tey kriteriu sum í løtuni áseta karmarnar fyri veiðutrýst og veiðuorku fyri vinnuna eru tey røttu - tí forðað verður samstundis eisini fyri endurnýggjan hjá pørtum av vinnuni - men tað er kanska meiningin - ella??

# Gangnýta vit alt tilfeingi er møguleiki fyri búskaparvøkstri

EYÐGUNN SAMUELSEN
Forkvinna í Demokratia



Í londunum kring okkum komu kvinnurnar í stórum tali út á arbeiðsmarknaðin frá 1960'unum og frameftir. Havi ikki funnið tøl fyri Føroyar, men nakað tað sama hendi í Føroyum frá síðst í 60'unum, tá talið av arbeiðsplássum í fiskivinnuni á landi øktist í stórum. Í Danmark kom stígur í økingina av kvinnupartinum av arbeiðsmegini í 1980'unum, og er talið av kvinnum í arbeiðsstyrkini í Danmark, í mun til menn, áleið 88%. Finland hevur hægsta talið áleið 95%. Svøríki og Noreg liggja eisini hægri enn Danmark. Hvussu talið er í Føroyum, vita vit ikki, men tað er neyvan hægri enn í Danmark. (Kelda: Børsens nyhedsmagasin 10. mai 2007).

Í Danmark eins og í Føroyum er full ferð á búskapinum, tosað verður dúgliga um, hvussu ein kann økja arbeiðsstyrkina fyri at fáa framhaldandi búskaparvøkstur. Tosað verður um at fáa innflytarnar í arbeiði og við at flyta inn fremmanda arbeiðsmegi. Í Føroyum er arbeiðsloysi metlágt, og tjakið um fremmanda arbeiðsmegi er eisini ovarlaga á breddanum.

Er tað so í Føroyum, at 8% færri kvinnur enn menn eru í arbeiðið (hetta er lutfallið í Danmark) so loysir tað seg at hugsa um, hvørjar skipannir á arbeiðsmarknaðinum skulu bøtast fyri at fáa fleiri kvinnur út á arbeiðsmarknaðin.

At hetta loysir seg í øktari vælferð er eisini prógvað. Í USA er lutfallið tað sama sum í Danmark, har hava búskaparfrøðingar rokna út, at kom kvinnuparturin á arbeiðsmarknaðinum á hædd við mennirnar vildi hetta viðført ein vøkstur í BTÚ í USA á 9%, fyri ES-økið hevði vøksturin verið 13% og í Japan 16%. Siga vit, at búskaparvøksturin í Føroyum hevði ligið onkustaðni millum hesi tøl, so loysir tað seg at hugsa meir fleksibult í samband við okkara arbeiðsmarknað.

Spurningurin er, hvussu kunnu vit økja um okkara egnu arbeiðsstyrki, heldur enn at dúva á fremmanda arbeiðsmegi við teimum trupulleikum, ið tað viðførir. Tað skuldi verið eyðsæð, at lættari er at gagnnýta okkara egna tilfeingi fyrst.

Skulu fleiri kvinnur út á arbeiðsmarknaðin, so má tað gerast hugaligt at fara til arbeiðis, og har er tað ikki nokk bert at hugsa um lønarkrónur. Barnaansingin skal vera góð, fyri ikki at tala um til at fáa. Hon skal vera bílig og fleksibul, tað vil siga taka hædd fyri skiftandi arbeiðstíðum. Barsilsskipanin skal vera góð, og foreldur skulu hava umsorgannardagar, so tey kunnu vera heima hjá sjúkum børnum og aðrar tíðir við uttan ampa og fíggjarmiss. Ynskja vit ein rúmligan arbeiðsmarknað, skal ein heilt nýhugsandi familju- og arbeiðsmarknaðarpolitikkur til. Ikki minst mugu korini hjá einligum forsyrgjarum broytast grundleggjandi. Hetta er nakað, ið bæði land, kommunur og arbeiðsmarknaðurin áttu at hugsa um. Vit síggja í hvussu so er við hesum tølum, at tað loysir seg bæði í krónum og oyrum og um vit veruliga ynskja økta vælferð til øll.

*http://heima.olivant.fo/~eydgunn*




## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum

Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

## Lærarastørv og størv sum stuðul í Tofta skúla

Hesi størv verða lýst leys til setanar frá 1. august 2007 at rokna:

- **2 føst lærarastørv, fulla tíð, harav 1 vegna serligan tørv**
- **2 tíðaravmarkað lærarastørv, fulla tíð** fyri lærara í farloyvi, lækkað tímatal og serligan tørv
- **1 tíðaravmarkað lærarastarv uml. 17 t/v** endaliga tímaáseting av hesum starvi verður ásett eftir 1.september 2007
- **4 tíðaravmarkað størv sum stuðul** 3 størv eru 24 t/v og 1 starv er 23 t/v talan er um stuðul til næmingar, sum hava serligan tørv

**Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu átaka sær:**

- støddfrøði og føroyskt í framhaldsdeildini
- ítrótt í grund- og framhaldsdeildini
- danskt og enskt í grunddeildini
- handverk og list í grund- og framhaldsdeildini
- serligan tørv

**Vit vænta at tú:**

- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Størvini sum stuðlar verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi leygardagin 23.juni kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur komandi skúlaár uml. 190 næmingar í 1. – 10.fl. og um 20 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/